# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 20 árum síðan:

## Landsstýrið skipað í 1989


Seks nýggir landsstýrismenn

*Teir seks landsstýrismenninir f.v.: Tordur Niclasen úr Kristiliga Fólkaflokkinum, Karl Heri Joensen úr Sjálvsstýrisflokkinum, Jógvan Sundstein í Fólkaflokkinum, Signar Hansen og Finnbogi Isaksen úr Tjóðveldisflokkinum og Anfinn Kallsberg úr Fólkaflokkinum*




Sosialurin skrivar leygardagin 21. januar 1989 at nýggja fýraflokka landsstýrið varð valt mikudagin.

Jógvan Sundstein í Fólkaflokkinum verður løgmaður og skal umsita stýrisskipanarmál og uttanríkismál. Anfinn Kallsberg úr Fólkaflokkinum skal umsita fiskivinnumál, aling og havbúnað.

Signar Hansen og Finnbogi Isaksen eru landsstýrismenn fyri Tjóðveldisflokkin. Signar er valdur til varaløgmann. Finnbogi skal umsita fíggjar- og búskaparmál, útvarp og sjónvarp. Tjóðveldisflokkurin skal eisini umsita t.d. skúlamál, ferðavinnumál, orkumál, lógarmál, arbeiðara- og handilsmál.

Karl Heri Joensen úr Sjálvsstýrisflokkinum skal m.a. umsita strandferðsluna, vega- og havnamál, loftferðslu, menatanarmál, kirkjumál og postmál,

Tordur Niclasen úr Kristiliga Fólkaflokkinum skal m.a. umsita heilsumál og almannamál.

## Dagurin

**21. januar. Agnes**, deyð umleið ár 300. Halgisøgan um Sanktu Agnes er ein av teimum elstu frásøgnunum um blóðvitni í fornkirkjuni. Hon vildi giftast heidnum fríggjara og varð tikin av døgum. Grikst navn ið merkir: *hin óspilta*.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Kennist onkur við kvinnurnar?



*Umgdómsmynd av seks vinkonum í grannabygdunum Haldarsvík og Tjørnuvík. Myndin er tikin umleið 1915. Aftasta rað f.v.: ókend, Elsebeth Elena Guttesen, f. Joensen, Haldarsvík, og Marin Malena (eftirnavn?) Fremra rað f.v.: ókend, Súsanna Joensen, Haldarsvík, og Anna Juul Petersen, f. Joensen, Haldarsvík. Elsebeth Elena Guttesen og Anna Juul Petersen eru systrar. Um onkur kennist við tær ókendu genturnar á myndini ella veit meira um tær, er viðkomandi vælkomin at ringja til Eyrith Guttesen Leyni á tel. 313784 ella 513784.*

*Myndaeigari: Eyrith Guttesen Leyni*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Rigmor Thomsen** Norðragøtu, andaðist í Slagelse, sunnudagin 18. januar, 86 ára gomul.

**Hans Súni Joensen** við Garð, Leirvík, andaðist í heiminum mánadagin, 60 ára gamal.

Jarðarferð **Elsabeth Bjarnason** fer til gravar úr Fossvogskapell í Reykjavík hósdagin 22. januar klokkan 13.

†

Okkara elskaði maður og pápi

**Ian Onghamar**

andaðist á Gentofte Hospital 20. januar, 50 ára gamal.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Eyðna og Lilian**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða mamma, svigarmamma, omma og langomma okkara

**Elma Kristina Bech**

ættað úr Porkeri, búsitandi i Boeslunde

andaðist 18. januar 2009 .
Jarðarferðin verður fra Holsteinsborg kirkju í Rude leygardagin 24. januar kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Erlendur, Bjørn og Naomi**

WWW.BST.FO



Skeið í landbúnaði

Búnaðarstovan skipar fyri einum 2-daga skeiði í landbúnaði á Búnaðardeplinum í Kollafirði 25. & 26. februar 2008. Skeiðið gevur førleika til at festa smá festir – minni enn 50 áseyðir og eingi mjólkneyt, og er fyrst og fremst ætlað teimum, sum ikki hava landbúnaðarútbúgving og hava ætlanir um at yvirtaka eitt lítið festi.

Kostnaður fyri skeiðið er kr. 700,- tá eru morgun-matur, døgurði og náttturði báðar dagarnar íroknaðir.

Pláss er fyri 30 luttakarum.

Tilmelding á telefon, fax ella við teldu-posti í seinasta lagi 13. februar 2009.

BÚNAÐARSTOVAN
Frammi í Dali 166 • 410 Kollafjørður
tlf. 47 90 00 • fax 47 90 20 • bst@bst.fo